# Stórsigur til Kallsberg

**– Tað kom púra óvart á meg, at eg skuldi fáa so nógvar atkvøður, sigur stóri atkvøðuslúkurin á fólkatingsvalinum týskvøldið. Føroyski veljarin hevur styrkt politisku støðuna hjá Anfinni Kallsberg, eftir at fleiri flokkar vrakaðu hann sum løgmann eftir seinasta løgtingsval**

POLITIKKUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað kann verða trupult at hoyra á honum, um hann er í góðum lag ella í ringum lag.

Róligi klaksvíkingurin á Viðareiði er sum politikari seigligur, umhugsin og eitt sindur varin.

Hann leypur ikki fram av og tosar sjáldan við stórum orðum alment.

Men týskvøldið fekk Anfinn Kallsberg ikki fjalt gleðina yvir óføra valið, sum hann hevði. Hann fekk 3276 atkvøður.

Tað skein ígjøgnum, at hann var ovfarin og ovurfegin um stóru undirtøkuna, sum hann hevði fingið frá veljarunum.

– Tað kom púra óvart á meg, at eg skuldi fáa so nógvar atkvøður. Eg hevði roknað við, at tað fór at vera tætt ímillum meg og Óla Breckmann, og tí hevði eg als ikki væntað hetta úrslitið, sigur Anfinn Kallsberg, sum mikumorgunin leitaði sær norður aftur til Viðareiðis, og mikukvøldið beyð hann fólki inn á Hotel Norð, har valsigurin skuldi feiðrast.

– Eg merkti tó eitt sterkt rák í Klaksvík týsdagin, men at tað skuldi gerast til so nógvar atkvøður kring alt landið, hevði eg ikki væntað.



*– Tjóðveldisflokkurin vildi ikki arbeiða saman við mær, men eg haldi, at tvey tey seinastu valini hava víst, hvat føroyingar halda um meg sum politikara, og eg eri sera takksamur fyri tann stuðul, sum eg havi fingið, sigur Anfinn Kallsberg, nýggjur fólkatingslimur hjá føroyingum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Vrakaður men styrktur

Anfinn Kallsberg var løgmaður hjá fullveldissamgonguni frá 1998 og fram til í fjør, tá ið samstarvið við Tjóðveldisflokkin slitnaði, eftir at bókin »Skjót journalistin« var komin út.

Eftir løgtingsvalið í fjør vildi Tjóðveldisflokkurin ikki hoyra talan um, at Anfinn Kallsberg skuldi verða løgmaður aftur, og hesa støðu hevði eisini onkur annar flokkur.

Men hóast fleiri politiskir flokkar ikki vildu hava Anfinn Kallsberg sum løgmann, so hava tvey tey seinastu valini víst, at fyrrverandi løgmaðurin stendur sterkari enn nakrantíð áður í føroyskum politikki.

Til løgtingsvalið í fjør hevði hann stóra framgongd í Norðoyggjum og fekk fleiri atkvøður, enn nakað valevni áður hevði fingið. Og til fólkatingsvalið týskvøldið høvdu føroyingar kring alt landið fyri fyrstu ferð aftur møguleikan at siga sína hugsan um Anfinn Kallsberg, og hann fekk eina dygga álitisváttan frá veljarunum og gjørdist toppskorari.

– Tjóðveldisflokkurin vildi ikki arbeiða saman við mær, men eg haldi, at tvey tey seinastu valini hava víst, hvat føroyingar halda um meg sum politikara, og eg eri sera takksamur fyri tann stuðul, sum eg havi fingið. Flokkurin hevur staðið væl saman, og tað tykist, sum um fleiri onnur valevni hava rikið fyri meg, sigur Anfinn Kallsberg.

## Einki fullveldi í fólkatinginum

Anfinn Kallsberg ætlar sær ikki at fara upp í Norðuratlantsbólkin í fólkatinginum, sum er eitt samstarv millum Høgna Hoyda og tey bæði grønlendsku fólkatingsumboðini.

– Eg ætli mær ikki at fara við í eitt samstarv, sum hevur eitt endamál, og tað er, at fullveldismálið skal viðgerast á danatingi. Fullveldismálið skal viðgerast í Føroyum, og eg ætli mær heldur at arbeiða fyri teimum málum, sum landsstýrið hevur sett sær fyri, sigur Anfinn Kallsberg.

– Tað er umráðandi, at vit fáa gjørt eina yvirtøkulóg, so vit í Føroyum einsamøll gera av, hvussu ferðin á yvirtøkunum skal vera. Til seinast skal fólkið sjálvandi fáa møguleika at siga sína hugsan um fullveldið.

Anfinn Kallsberg heldur, at tað føroyingar og grønlendingar kunnu ikki samstarva um fullveldið.

– Tað er eitt afturstig fyri føroyingar, um vit skulu arbeiða saman við grønlendingum um fullveldið. Grønland er ikki á bylgjulongd við Føroyar í hesum máli, og tí kann gongdin hjá okkum og teimum ikki blandast saman, heldur Anfinn Kallsberg.

# – Hetta var ein stórur lætti

**Harða stríðið í Tjóðveldisflokkinum seinasta hálva árið skaddi ikki flokkin, og formaðurin kom styrktur frá fólkatingsvalinum týskvøldið. Nú skal ein loysn finnast, so flokkurin ikki endar aftur í sama ruðuleika, sigur Høgni Hoydal**

FÓLKATINGSVAL

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Høgni Hoydal hevur meira enn einaferð síðstu mánaðirnar verið trongdur upp í ein krók. Innanhýsis stríðið við Torbjørn Jacobsen hevur verið slítandi fyri hann og flokkin, og tí var stórur spenningur um, hvussu Tjóðveldisflokkurin og serliga formaðurin fór at klára fólkatingsvalið hesaferð.

Úrslitið var ein álitisváttan til Høgna Hoydal, sum fekk enn fleiri atkvøður enn á tí frálíka valinum fyri trimum árum síðani. Flokkurin varðveitti sítt umboð í fólkatinginum, og einki spurnartekin kann setast við styrkina hjá formanninum í Tjóðveldisflokkinum.

## Ein stórur lætti

Høgni Hoydal fór úr 2640 atkvøðum í 2001 og upp í 2799 atkvøður hesaferð. Framgongd, sigur og ein lætti.

– Ja, tað kendist sum ein stórur lætti, at valið varð so gott. Tað var sum ein stór byrða fór av herunum, sigur Høgni Hoydal.

– Flokkurin hevur verið ígjøgnum eina trupla tíð, men vit fingu eina álitisváttan sum flokkur á hesum valinum.

## Nú skal friður valda

Samstundis sum Høgni Hoydal staðfesti sína støðu sum leiðari í Tjóðveldisflokkinum, fekk Torbjørn Jacobsen eisini fleiri atkvøður.

Tað hevur leingi verið hildið, at báðir politikararnir kundu ikki halda fram í flokkinum eftir harða stríðið teirra millum, men nú eru aðrir tónar at hoyra.

– Vit tóku eitt time-out áðrenn fólkatingsvalið, og eg haldi, at veljarin nú hevur sagt sína greiðu hugsan um, at vit mugu finna eina loysn í flokkinum, so at vit ikki enda aftur í sama ruðuleika sum áðrenn valið. Og tað ætli eg mær at arbeiða fyri, sigur Høgni Hoydal.

## Samstarv kann halda fram

Høgni Hoydal var í 2001 valdur í fólkatingið, og hann megnaði at endurvinna sessin á valinum hesaferð.

Tað sama gjørdu hinir báðir fólkatingslimirnir úr Grønlandi, sum hann hevur arbeitt saman við í Norðuratlantsbólkinum.




*– Vit tóku eitt time-out áðrenn fólkatingsvalið, og eg haldi, at veljarin nú hevur sagt sína greiðu hugsan um, at vit mugu finna eina loysn í flokkinum, so at vit ikki enda aftur í sama ruðuleika sum áðrenn valið. Og tað ætli eg mær at arbeiða fyri, sigur Høgni Hoydal*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

– Eg tosaði við annan teirra í nátt, og tað er ein møguleiki fyri, at vit halda fram við Norðuratlantsbólkinum, sigur Høgni Hoydal.

## Norðuratlantsbólkurin afturvaldur

Allir teir tríggir fólkatingslimirnir, sum farnu árini hava samstarvað í Norðuratlantsbólkinum á fólkatingið, vóru afturvaldir týskvøldið.

Í Føroyum vann Høgni Hoydal annan fólkatingssessin, og í Grønlandi vóru teir báðir, Lars Emil Johansen úr Siumut og Kubik Kleist úr Inuit Ataqatigiit, afturvaldir.

Lars Emil Johansen segði týskvøldið, at valúrslitið er ein viðurkenning av arbeiðinum hjá Norðuratlantsbólkinum, sum teir báðir manna saman við Høgna Hoydal.